ÍTRÓTTAR Sosialurin

Nr. 15 ★ leygardagur 6. februar 1988

Hondbóltur, 1. deild menn: Kyndil—KÍF 22—21 (11—12):

Ógvuliga tepur sigur

Kyndil kundi tað sama tapt dystin ímóti KÍF hóskvøldið ímóti KÍF hóskvøldið



Dysturin í høllini á Hálsi hóskvøldið millum 1. deildarliðini hjá Kyndli og KÍF, gjørdist av sonnum spennandi. Fyri at økja um spenningin um endaspælið, skuldi KÍF helst vinna Kyndil, og týðuliga sást, at hetta vóru ætlanir hjá kollfirðingum.

KÍF kom betur frá byrjanini, og fórdu so at siga allan fyrra hálvleik, til tíðir við fleiri málum. Hanus Joensen hevði so avgjørt ein góðan dag, og var rættuliga til at kenna aftur frá fyrr av. Hann fekk eisini fleiri mál hendan hálvleikin. Petur Martin og Vagnur vóru so avgjørt eisini væl fyri, og í seinnu helvt av fyrra hálvleiki funnu kyndlaleikararnir út av, at ansa betur eftir Vagni á strikuni.

Kollfirðingar striddust nógv meira í fyrra hálvleiki enn Kyndil, og hetta var ein orsøkin til, at hálvleiksstøðan varð 12-11 til KÍF. Avgjørt uppiborið.

Í seinna hálvleiki sá út til, at kollfirðingar fóru avstað við sigrinum. Teir øktu beinanvegin um leiðsluna við tveimum málum til støðuna 15-12. Men so kom steðgur í.

Kyndlaleikararnir mistu ikki mótið, og byrjaðu at striðast eins og kollfirðingar í fyrra hálvleiki. Hetta gav eisini úrslit. Hanus Joensen varð mansuppdekkaður og hetta gav eisini »bonus« hjá Kyndli.

Tað eydnaðist soleiðis Kyndli at koma upp á javnleik, og liðini fylgdust síðani upp eftir. Stundum var KÍF frammanfyri og stundum Kyndil, men bert við einum máli.

Spenningurin bara økti ist sum tíðin leið. Men í seinasta minuttinum eydnaðist tað Kyndli at avgera dystin. Teir vunnu við 22 málum móti 21, so avgjørt ein tepur sigur, sum eins væl kundi farið til Kollafjarðar.

Um Kyndlaliðið kann sigast, at teir ikki hava havt eitt so breitt, gott og støðugt lið í fleiri ár. Teir leika skjótan og vakran hondbólt, og tað er eitt satt upplivilsi at siggja hetta liðið, tá ið teir eru upp á tað besta.

Liðið hjá KÍF er sum vit fyrr hava sagt, meira óstøðugt sjálvt um teir eftir hondini eisini hava eina ávisa breidd. Fleiri heilt góðir leikarar eru á liðnum, og tá ið teir spæla upp á »sítt« besta, eru teir so avgjørt á sama støði sum Kyndil og VÍF. Um sama manningin verður hjá teimum komandi ár, er ikki óhugsandi, at teir fara at hótta oddaliðini enn meira enn í ár.

Dómararnir hendan dystin vóru teir somu sum í dystinum millum Kyndil og VÍF í seinastu viku, og aftur hesaferð komu teir væl frá dømingini, og aftur hesaferð vistu teir, at dómararnir kunnu gera sitt til, at áskoðararnir sleppa at siggja ein væl leiktan dyst.

Gdm-

Hondbóltsskrá

Nú endaspælið í báðum deildunum fer at byrja, verður her sett skráin fyri báðar deildirnar og klokkutíðirnar fyri fyrstu vikuna, í teimum høllum, har tær ikki longu eru lagdar.

Skála

Leygardagin 6/2

12.00	Skála—Stjørnan	gentur 16
12.55	Skála—VÍF	II kvinnur
14.05	StÍF—VÍF b	dreingir 12
14.40	StÍF—VÍF	IV menn
15.50	EB—VÍF	II menn
17.00	EB—NSÍ	dreingir 14
17.45	StÍF—NSÍ	dreingir 16

Tórshavnar Ítrótt-Ítróttar- og Samkomuhøll

Hósdagin 4/2

20.15	Kyndil—KÍF	I menn

Sunnudagin 7/2

16.00	H 71—VÍF	I menn
17.10	Kyndil—Søljan	I kvinnur

Mikudagin 10/2

18.30	Neistin—NSÍ	I kvinnur
19.45	Neistin—NSÍ	I menn

Vágur

Sunnudagin 7/2

15.00	VB—TB	I kvinnur

Annars verða feløgini mint á, at leiktíðirnar fyri dystirnar hjá teimum 10 ára gomlu komandi vikuskiftið eru lagdar

Kappingarskrá

1. deild kvinnur

Meistarabólkurin

07.02	Kyndil—Søljan	H
10.02	Neistin—NSÍ	H
17.02	Kyndil—Neistin	H
20.02	Søljan—NSÍ	G
24.02	NSÍ—Kyndil	R
27.02	Kyndil—NSÍ	H
28.02	Søljan—Neistin	G
02.03	Neistin—Søljan	H
05.03	Søljan—Kyndil	G
06.03	NSÍ—Neistin	R
12.03	Neistin—Kyndil	H
13.03	NSÍ—Søljan	R

Niðurflytingarbólkurin

07.02	VB—TB	V
13.02	VIF—VB	Ve
20.02	VB—VÍF	V
21.02	TB—VÍF	Tv
28.02	VÍF—TB	Ve
06.03	TB—VB	Tv

Kappingarskrá

1. deild menn

Meistaraskapsbólkurin

04.02	Kyndil—KÍF	H
07.02	H 71—VÍF	H
13.02	KÍF—VÍF	Sk
17.02	Kyndil—H 71	H
20.02	H 71—KÍF	H
20.02	VÍF—Kyndil	Ve
27.02	H 71—Kyndil	H
28.02	VÍF—KÍF	Ve
06.03	VÍF—H 71	Ve
06.03	KÍF—Kyndil	Sk
12.03	KÍF—H 71	Sk
12.03	Kyndil—VÍF	H

Niðurflytingarbólkurin

10.02	Neistin—NSÍ	H
14.02	Neistin—StÍF	H
20.02	StÍF—Neistin	Sk
28.02	NSÍ—StÍF	R
06.03	NSÍ—Neistin	R
12.03	StÍF—NSÍ	Sk

SPURNINGAR UM LÍVSTRYGGING? SET TEG Í SAMBAND VIÐ UMBOÐ OKKARA:

Klaksvík:
Agnar á Dul, tlf. 55026
Tryggingarvirkið Vágastein, tlf. 56190

Fuglafjørður:
Óbert Blæsen, tlf. 44066

Runavík:
Høvdstein Ellingsgaard, tlf. 47056
Tryggingarvirkið í Sandagerði, tlf. 48190

Vestmanna:
Johan E. Poulsen, tlf. 24211

Sandavágur:
Jóan Jákup Thomsen, tlf. 32487

Miðvágur
Tryggingarvirkið, tlf. 33090

Sandur:
Steinbór Fagradal, tlf. 61046

Tvøroyri:
Hjalmar og Tórur Enni, tlf. 71081
Erling Poulsen, tlf. 73044

Vágur
Tryggingarvirkið, tlf. 73890

Tórshavn:
Kjartan Dalsgaard,
Havdalsvegur 8, tlf. 15232

...ella støkkið inn á gólvið á tryggingarvirkjunum okkara í Klaksvík, Runavík, Miðvági, Vágur og Tórshavn

FØROYA LÍVSTRYGGING

tlf 14690 12919